

Jóannes Eidesgaard
*landsstýrismaður*

# Ætlanin við Skálafjarðar-tunlinum aftur á beint

BankNordik er komin við sera áhugaverdum og sera skilagóðum uppskoti um, hvussu ætlanin við einum Skálafjarðartunli eigur at verða løgd til rættis. Tað almenna skal inn sum eigari og byggiharri og ikki longur eitt felag, sum privat áhugaði eiga.

Á fundi við umboð fyri BankNordik 20. jan. varð eg kunnaður um eina ætlan, sum BankNordik hevur arbeitt við viðvíkjandi bygging av Skálafjarðartunlinum. Orsøkin til, at BankNordik hevur tikið hetta stigið er, at framtíðin hjá P/F Skálafjarðartunlinum er meira enn ivasom í kjalarvørrinum av krakkinum í Eik.

Uppskotið er, at tað almenna setur á stovn eitt partafelag, sum skal eiga og reka Vágatunnilin og Norðoyatunnilin. Hetta almenna partafelagið skal so eisini byggja og reka Skálafjarðartunnilin. Eginognin og inntøkumøguleikarnir hjá felagnum verða so mikið góðir, at møguleikar fyri góðari og munandi bíligari fígging avgjørt eru til staðar.

Sjálvandi merkir hetta, at inntøkurnar frá Vágatunlinum og Norðoyatunlinum halda áfram, eftir at lánini eru afturgoldin. Hetta er fótongulin í uppskotinum hjá Bank Nordic, tí hvat fara vágafólk og norðoyingar at siga til, at tey skulu gjalda tunnilsgjald eftir, at tunlarnir eru afturgoldnir.

Hin vegin er Smyril goldin, men vit gjalda framvegis fyri at sigla, og tað sama kunnu vit siga um Teistan og aðrar farleiðir hjá SL.

Avbjóðingin er at gera inntøkurnar til almenna partafelagið meira samhaldsfastar. Kanska kundi gjaldið fyri báðar tunlarnar farið nakað niður, samstundis sum vit útbyggja inntøkumøguleikarnar av veganetinum til onnur knútapunkt í ferðsluni. Kanska til bergholið millum Kaldbaksbotn og Kollafjørð ella tvørtur um brúnna um Streymin.

Ein annar møguleiki er, at vit innbyggja eina kollektiva fígging til felagið yvir vegskattin, soleiðis at tað ikki bert verða vágafólk og norðoyingar, sum skulu standa fyri inntøkunum hjá almenna partafelagnum, meðan Skálafjarðartunnilin verður bygdur.

Megna vit hetta, og tað eiga vit at kunna, so kunnu vit sum almennur myndugleiki átaka okkum hesa uppgávu, sum tað almenna og ikki tað privata eigur og skal loysa.

Ein slík skipan kann so eisini gera tað møguligt, at vit longur út í framtíðina kunnu fara undir enn eina stóra verkætlan nevniliga um Skopunarfjørð. Inntøkurnar frá Skálafjarðartunlinum, tá hesin verður tikin í brúk, verða rættiliga stórar, og kann felagið tí fara í gongd við nýggjar uppgávur.

Hetta er á leið tann ætlan, sum vit høvdu í CHE-samgonguni. Eg haldi, at BankNordik veruliga hevur gjørt hol í sjógvin við hesum sera áhugaverda uppskoti til, hvussu vit í framtíðina kunnu fíggja slíkar risa verkætlanir, sum ikki rúmast inni á fíggjarlógini.



Óli Mikkelsen
*lækni*

# Ymsir roknihættir

Klaksvíkingar føra fram, at nú Norðoyatunnulin er komin, er koyrandi báðar vegir, og so er líka langt úr Klaksvík til Havnar sum úr Havnini til Klaksvíkar.

Hetta verður nýtt sum grundgeving, tá okkurt skal vera í Klaksvík og helst bara í Klaksvík. – Í løtuni snýr tað seg mest um skúlamál og heilsumál.

Landsumfatandi endurvenjingardeild í Klaksvík sum dømi.

Allir føroyingar við ávísum tørvi skulu til Klaksvíkar til viðgerð, ambulant ella innleggjast.

Hvør fær nyttu av, at hon er í Klaksvík. Allir norðoyingar hava sjálvandi stytstu leið til deildina, og hjá havnarfólki er líka stutt til Klaksvíkar sum hin vegin.

Latið okkum seta nøkur tøl saman, tølini eru úr seinasta álmanakka.

***Sí talvu***

| | Fólk |
|---|---|
| Suðuroy | 4754 |
| Sandoy | 1371 |
| Vágar | 3101 |
| Vestmanna | 1202 |
| Kvívík | 584 |
| Í alt | 11012 |
| Havnin | 20105 |
| Samanlagt | 31117 |
| Klaksvík | 4845 |
| Norðoyar | 5867 |

Her sæst at 11.012 fólk – at kalla dupult so nógv sum í Norðoyar Sýslu – fyrst skulu fram við Havnini, áðrenn tey koma á teinin millum Havnina og Klaksvík.

Saman við Havnini eru so 31.117 fólk sum høvdu havt fyrimun av, at deildin var í miðøkinum - meir enn fimm ferðir so nógv, sum fólkið í Norðuroyggjum.

Eftir er Eysturoy – 10.863 fólk – og nakrar bygdir í Streymoy – 1.070 fólk.

Her veldst aftur um roknihátt.

Klaksvíkingar hava áður kannað sær stóran bita burturav. Kanska er tað ikki burturvið at lata eysturoyingar sleppa at siga sína hugsan, so hetta bítið kann bíða.

Hugsa vit frameftir, kemur ein tunnil afturat inn í myndina: sambandið millum suðurendan av Eysturoy og Streymoynna. Hesin tunnil, sum tað loysir seg at gera, hevði helst verið í gerð nú, um málið ikki varð forbronglað í løgtinginum.

Sum fólkabýtið og samferðslukervið er í Føroyum í dag, er tað skeivt at hála eina gamla avoldaða sjúkrahúslóg fram og misbrúka hana til lokalpolitikk og serdeildir til Klaksvíkar Sjúkrahús.

Vit bíða spent eftir álitinum um urologiska deild á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, og áhugavert verður at síggja, hvussu víða álitið hevur verið til ummælis.



Gerhard Lognberg
*løgtingsmaður*

# Ja so var aftur eitt álop á okkara verkafólk

Í Degi og Viku fingu vit at vita, at flakafólkini vóru um at koppa samfelagnum

Fyri nøkrum árum síðan varð tosað um fastlønarskipan, tað gleddust fólkið um, men nú var landsstýrismaðurin Jóhan Dahl tráðspurdur um, hvat hann ætlaði. Hann læt seg fara við hesum rákinum, at tey á niðastu rók, tá tað viðvíkur løn, men samstundis sum hetta eru tey sum lyfta samfelagið upp, fingu ov nógv og tann lítla flakavirkisskipanin skuldi vekk.

Katrin Dahl Jakobsen var eisini spurd og svarar hon: »hesi fólk skulu hava mat á borðið, ja, latið okkum fáa teimum eina munandi betur skipan, enn tað sum er«.

### Avtoftað

Er meiningin at avtofta alt, sum hevur við fiskivinnu at gera, ja, sigið tað so.

So kunnu øll í okkara landi renna í jakkasetti og slips, so kunnu vit prøva, hvussu leingi samfelagið koyrur.

### Sjómenn og verkfall

Flotin liggur, eingir pengar til tær familjur, sum varða av.

800 fólk til hús vegna húsagang, tað hoyra vit lítið til.

### Á middegi

Hoyrdi stór tíðindi, vit skulu deila 3,5 mió út til listafólk og legði útvarpsmaður afturat, eg sá smílið ígjøgnum útvarpstólið »tað koma meira pengar seinni«.

Eg nevndi hetta í stuttari viðmerking í gjár, hetta var ikki væl dámt av viðmerkjarum úti á portalinum, men tað leggi eg einki í.

Hví kunnu hesi fólkini, sum skulu hava starvsløn, ikki heldur fáa eitt arbeiði til dømis á Kósini, Sandoy Seafood ella á onkrum øðrum virki.

Eg havi stóra virðing fyri mentan og list, men tað eru eisini onnur fólk, sum skulu hava møguleika í samfelagnum.

Tá nú so lítið av peningi er í okkara samfelag, og fólk hava stórar trupulleikar, tá er hetta beinleiðis forargilsi at hoyra um hasar ótrúligu starvslønirnar. Álvaratos er okkara samfelag úti at koyra.

Eg nevndi í viðmerkingini á tingsins røðarapalli, at til dømis fingu sjúk fólk ikki, í øllum førum, fylgjara niður til Danmarkar.

Nei latið okkum heldur hjálpa teimum, sum hava hildið okkara landi uppi og framhaldandi gera tað, heldur enn javnan at royna at psyka tey niður inntil tey rýma av landinum.

**Við javnaðarkvøðu**